HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Til:
Trivnaðarnevnd Løgtingsins

Tann: 2.5.2024
Mál: 23/10433
Viðgjørt: BL/GMM

Viðv. løgtingsmáli nr. 080/2023 um broyting í heilsutrygdarlógini

Løgtingið viðger í løtuni løgtingsmál nr. 080/2023. Lógaruppskotið er beint í Trivnaðarnevndina til víðari viðgerð.

TAKS hevur í telduposti boðað Heilsumálaráðnum frá, at tað er ein avbjóðing fyri TAKS at seta omanfyristandandi lógaruppskot í gildi 1. juli 2024. Hetta av tí, at undantak má verða fyri gjaldsskyldu fyri eitt heilt skattaár.

Heilsumálaráðið fer í hesum sambandi at heita á Trivnaðarnevnd Løgtingsins um at gera hesar broytingar í lógaruppskotinum:

Í § 1, nr. 3 verður orðingin í § 24, stk. 2, 2 pkt.: "Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin" strikað.

§ 1, nr. 4 verður orðað soleiðis:
"Í § 24 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn, um hvat ár og nær frá umsóknin skal vera galdandi fyri og um fráboðanarskyldu sambært stk. 2."

Í § 2, stk. 2 verður aftaná "2024" sett: ", og hevur virknað frá inntøkuárinum 2024"

Um ein umsøkjari sostatt søkir um undantak fyri heilsutrygdargjaldi t.d. tann 3. august 2024, hevur umsóknin virknað fyri inntøkuárið 2024.

Skotið er upp, at § 1, nr. 2-7 í lógaruppskotinum koma í gildi 1. juli 2024. Hetta soleiðis, at Heilsutrygd og TAKS fáa stundir at gera seg kláran til at umsita skipanina við undantak fyri heilsutrygdargjaldi.

Sambært omanfyristandandi broyting, kemur lógin í gildi 1. juli 2024, men hevur virknað frá inntøkuárinum 2024.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • www.hmr.fo • hmr@hmr.fo

Á fundi í Trivnaðarnevndini spurdi formaðurin í nevndini um pantiheimildina í § 26a. Til hetta er at siga, at tað er heimild at panta í § 24, stk. 3 í galdandi heilsutrygdarlóg. TAKS hevur, yvirfyri Heilsumálaráðnum, upplýst, at TAKS pantar eftir hesi áseting, um tað gerst neyðugt at panta. TAKS upplýsir víðari, at tey royna at fáa allar pantiheimildir í serlógum orðaðar eins og meira neyvt. TAKS metir, at tann orðingin, sum stendur í § 26a í lógaruppskotinum, er tann rætta.

Vinaliga,

Margit Stórá,
landsstýriskvinna

/Bjørgfríð Ludvig, aðalstjóri